# Populer Nýggjárskonsert



*Oddvør Johansen, urguleikari, metir Nýggjárskonsertina at vera populera. Tó heldur hon ikki at William Heinesen er til at kenna aftur í týðingini av hansara yrking, Tusinder master i regn*

**Oddvør Johansen var ein av teimum, ið noyddist at njóta Nýggjárskonsertina umvegis sjónvarp og útvarp. Hon metir Nýggjárskonsertina at vera fjølbroytta og populera, og alsamt betri umtókta millum fólk**

KONSERT
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Tey 650 atgongumerkini, ið vóru sett til sølu tíðliga í desember mánaði, vóru alt fyri eitt rivin burtur. Tí noyddust fleiri at njóta konsertini úr sofuni heima við hús, og var ein teirra urguleikarin Oddvør Johansen, ið annars plagar at vera á konsertini.

- Til Nýggjárskonsertina skal tónleikurin vera populerur, og hann má ikki vera alt ov eksperimerandi. Og konsertin var populer. Nógvur kendur tónleikur var á skránni, millum annað filmstónleikur, sigur Oddvør Johansen.

Viðvíkjandi stykkinum hjá Atla Kárason Petersen, sum var frumframført hetta kvøldið, dámdi henni væl stykkið, men hon saknaði William Heinesen í hesum.

- William Heinesen var ókenniligur í hasi týðingini. Hatta var bara Carl Johan Jensen, heldur Oddvør Johansen.

Um hon skal taka saman um og samanbera við onnur ár, metir hon at Nýggjárskonsertin alsamt vindur upp á seg, og at tað sæst aftur í hvussu skjótt tað er selja atgongumerkini til konsertina. Á konsertina var nógv gott fyri eygu og oyru, og var tað til dømis stuttligt at síggja Eivør, sum riggaði so væl, dirigenturin og tónleikurin var fínur, og í heila tikið var skráin festlig og fjølbroytt, heldur hon.

- Í heila tikið haldi eg at stemningurin á konsertini var góður, sigur Oddvør Johansen.

*William Heinesen:*
**Úr: Útsýni við ælaboga, 1972**

Mastra-skari í regni
Ein sovorðin herlig verðslig bygd!
Á farstøðini við ferjustaðið verður bygt út nú
og tjúknir av byggipøllum tarna
Ein skjótan munn av beiskum brennivíni
og avstað út í oynna hjá Cythere.
Síðan út í pallaskógin
síðan út á fjørðin
í bróstinum vellur og bralar

Gandaða regn, gandaða toka,
Gandaða hvønndagsverð
slups, krapi og runa.

Sum tað kortini er gott og rætt.
Sum alt lítilsvert er vælsignað
um baktjaldið bert er lívsfrískar vónir

*Carl Jóhan Jensen týddi*

*William Heinesen:*
**Tusinder master i regn**

Hvilken herlig verdslig by!
Afgangsstationen ved færgestedet bliver udvidet
og er blokeret af stilladslabyrinter.

Man snapper sig en mundfuld bitterbrændevin
før overfarten til Cytheres Ø.

Så ud i stilladsskoven.
Så ud på vandet
med en liden gejser i brystet.

Fortryllende regn og tåge.
Fortryllende hverdag,
sjask og sjap og pløre.

Hvor er det dog godt og rigtigt.
Hvor er det trivielle vidunderligt
når blot baggrunden er glad forventning!

*(Fra: "Panorama med regnbue" 1972)*



*Tónaskaldið, Sunnleif Rasmussen dámdi væl verkið eftir Atla Kárason Petersen, sum hevði sett lag til nýtýddu yrkingina eftir William Heinesen, Mastraskari í regni*

# Verkið væl valt

**Yrkingin hjá Williami Heinesen tók seg væl út í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið. Tað heldur Sunnleif Rasmussen, tónaskald, um nýskrivaða verkið eftir Atla Kárason Petersen**

KONSERT
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

- Mær dámdi væl hetta verkið. Yrkingin er væl vald, ikki minst til tað, tað er bílagt til. Eg kenni væl hesa yrkingina um Havnina, sum tá var ein bygd. Eg haldi, at tónleikurin var avvekslandi og mystiskur við djúpum tónum, og hevði hann nakað av fanfari yvir sær.

Kórsatsurin varð gjørdur soleiðis, at mann skilti væl tekstin tí hann varð lisin upp áðrenn tónleikurin byrjaði.

- Kórið hevði týðiligan tekst. Og teksturin sjálvur er øgiliga væl týddur, og málið er lætt. Mær dámdi væl tann einraddaða sangin í byrjanini og endanum, og tá endin kom, kundi eg hugsað mær at hoyrt meir.

